# Bilar

Nr. 214 • hósdagur • 7. november 2002 • 76. árg.

## Saab 9-3 Sport Sedan

**Tá Saab byrjaðu at gera bilar, beint eftir kríggið, var talan um bilar til vanliga fólkið. Tey seinnu árini hava teir eisini kappast í luksusklassanum. Nýggjasti Saab 9-3 verður einans gjørdur sum sedan og seinni sum stationvognur og cabriolet**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Saab 9-3 er bygdur yvir sama plattform sum Opel Vectra. Við tað at bilurin hevur størri aksilfrástøðu enn forgangarin, er hann eisini rúmligari innan við t.d. betri beinplássi.Vit hava vant okkum við at Saab 9-3 einans hevur fingist við 3 ella 5 hurðum og stórari baklúku, men hesin nýggi verður bert gjørdur sum sedan. Seinni kemur hann eisini sum stationvognur og cabriolet.

Trygd hevur verið eitt av vørumerkjunum hjá Saab. Bæði hvat aktivu og passivu trygdini viðvíkur livur Saab 9-3 upp til tað, sum vit kunnu vænta av einum Saab í 2002. Umframt ABS bremsur og elektroniska deiling av bremsukraftini (EBD), hevur hann eisini Traction Control System (TCS), Elektroniskan stabilisator (ESP), mekaniskan bremsuassistent (MBA) og (CBC) sum ger at til ber at bremsa og stýra samstundis, uttan at bilurin glíður út til síðuna.

Passiva trygdin er innbygd í bilin, soleiðis at hann gevur eftir, har sum hann skal, um hann verður ákoyrdur aftan ella frammanífrá. Nógvar ymiskar trygdarskipanir, ið eru innbygdar í bilin, verja bilførarin og tey ferðandi, sum t.d. Saab Active Restraint (SAHR) nakkapúturnar, sum higartil hava minkað munandi um skaðar á háls og nakka.




*John Vilhelm, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge við ábyrgd fyri Saab, er her við nýggjasta Saab 9-3 1,8t og einum av teimum fyrstu Saab 99, sum hann seldi fyri 25 árum síðan*



*Startlykilin er elektroniskur. Lykilin virkar eisini sum fjarstýring til hurðarnar og baklúkuna. Skiftandi elektroniskar kodur gera tað ómøgiligt at kopiera lykilin*



*Saab 9-3 innan. Display til radio, klokku o.a. situr omaná instrumentborðinum*

### 1,8t við 2,0 motori

Hóast 1.8t stendur á baklúkuni á bilinum, er motorurin er ein 2.0 litur. Motorurin við 150 hk og lágtrýstturbo er sera kvikur og hevur góða kraft. Aðrir bensinmotorar eru: 2.0 litur við 175 hk og 2.0 litur við 210 hk, báðir við hátrýstturbo. Turbodiesel motorurin er ein 2,2 litur við 125 hk og intercoolara.

Saab 9-3 er ein vælútgjørdur bilur, sum eisini fæst við nógvari eykaútgerð. Til dømis við tí sera framkomna ACC klimaanlegginum, har skipanin brúkar køldu luftina til at køla handskarúmið niður til ca. 8 stig. Eisini hevur bilurin "Night Panel", ið er ein uppfinning hjá Saab, har til ber at sløkkja øll ljósini á instrumentborðinum uttan speedometrið. Øll ávaringarljósini virka tó, tá brúk er fyri teimum. Hetta er gjørt, fyri at tað skal vera meira hvílandi fyri eyguni at koyra í myrkri.




*Saab 9-3 verður nú einans gjørdur sum sedan, seinni kemur hann sum stationvognur og sum cabriolet*

### Saab 9-3 1,8t Sport Sedan

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur 16V 4 syl. 150 hk |
| 0 - 100 km/t | 9,5 sek. |
| Bensinnýtsla | 12,2 km/l |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 463,5 cm |
| Breidd | 176,2 cm |
| Hædd | 146,6 cm |
| Eginvekt | 1425 kg |
| Totalvekt | 1975 kg |
| Viðførisrúm | 425 litrar |
| Prísur | kr. 299.400,- |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>við Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 345400 |

## Menn millum 45 og 54 ár koyra best

**Í FDM limablaðnum, Motor, hava teir roknað uppá tølini frá Danmarks Statistik um ferðslu. Úrslitið teir komu til varð, at menn millum 45 og 54 ár koyra tryggast, samstundis sum ungir menn millum 18 og 24 ár eru teir hættisligastu í ferðsluni**

FERÐSLA
*Magnus Gunnarsson*




*Ungir menn millum 18 og 24 ár eru teir hættisligastu í ferðsluni*

*Mynd: FDM / Motor*

Bilførarar í aldursbólkinum millum 45 og 54 ár koyra flestar kilometrar, áðrenn teir koma út fyri einum ferðsluóhappi við persónsskaða. Útrokningarnar eru gjørdar við miðaltølum fyri ferðsluóhapp við persónsskaða og talið av koyrdum kilometrum í árunum frá 1998-2000, deilt uppá aldursbólkar og kyn.

Teir hættisligastu bilførararnir eru ung og eldri av báðum kynum. Menn millum 18 og 24 ár eru teir hættisligastu í ferðsluni, bæði fyri seg sjálvar og onnur. 10.000 menn í hesum aldursbólkinum koyrdu einans 136 km, áðrenn eina teirra kom út fyri einum ferðsluóhappi. Talið hjá monnum millum 45 og 54 er fimm ferðir hægri. Samanumtikið koyra kvinnur longri enn menn, áðrenn tær koma út fyri einum ferðsluóhappi við personsskaða.

*Kelda: FDM / Motor*

## Saab 99 frá 1977

**Fyri 25 árum síðan seldi Saab Service Yviri við Strond hendan myrkabrúna Saab 99 til Osvald Olsen á Sandi. Í dag er tað Petur Olsen, abbasonur Osvald, sum eigur bilin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tað var 9. september 1977, at Osvald Olsen á Sandi keypti hendan Saab 99 frá Saab Service Yviri við Strond. Hetta var sama árið, sum fyritøkan varð stovnað við John Vilhelm sum stjóra. Bilurin varð skrásettur við nummarplátuni F 60.413. Í dag er tað Petur Olsen í Havn, abbasonur Osvald, sum eigur bilin. Bilurin er væl hildin og í sera góðum standi. Hann er nýliga lakkeraður og sær út sum nýggjur.




*Saab 99 hjá Petur Olsen. Bilurin er heilt originalur við upprunaligari nummarplátu*

### Postkassabilur




Hesin reyði Renault 5 vøruvognurin sær út sum ein postkassi aftan. Søgan sigur tó onki um at bilurin kann brúkast til enda málið.

*Kelda: FDM / Motor*

### Fiesta og ADAC



Ford Fiesta hevur fingið 4 stjørnur í týsku ADAC crashtestunum. Eftir ein frontalan stoyt ið 64 km/t kundu hurðarnar á bilinum uttan trupulleikar latast upp, og kabinan var heil. Annars meintu teir, at gardinairbag átti at verið standard útgerð í bilinum

*FDM / Motor*

### Volvo og trygd



Volvo hava mist 13 prosent av søluni í USA. Ein av orsøkunum sigst vera at teir hava marknaðarført Volvo eins og onnur bilmerkir. Leiðslan hevur nú tikið avgerð um, at teir aftur skulu marknaðarføra Volvo sum tann tryggasta bilin á marknaðinum

*Kelda: Motor Magasinet*